# Væleydnað stuðulskonsert

**Stuðulskonsertin í Læraraskúlahøllini fríggjakvøldið kundi verið betri vitjað, men stigtakararnir rukku endamálinum, ið var at fáa til vega faddrar til neyðstødd bøn. Og tað eru væl nøgdir fyrireikarar, ið nú hvíla seg, tí talan gjørdist um eina sera góða konsert, við serliga góðum huglag**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

– Eg eri væl nøgd. Tað gjørdist ein sera góð konsert, ið hevði eitt heilt serligt huglag (stemningur, blðm.). Talið av áhoyrarum kundi verið størri, tí har vóru eini hundrað fólk, ella har á leið, men konsertin gjørdist so avbera góð og tað var líkasum nakað heilt serligt yvir tiltakinum. Nøkur av teimum, ið skuldu á pallin fyrst, skuldu víðari at syngja aðrastaðni, men vórðu tó verðandi alla konsertina, sigur Angela Petersen, fyreikari.

Tað var Skandinaviska Barnamissiónin, ið heitti á hana um at skipa fyri tiltakinum. Felagsskapurin hevur ferðast í Føroyum síðstu dagarnar. Endamálið er at fáa til vega faddrar, ið hjálpa neyðstøddum børnum í Ukraine og á Filipsoyggjum. Hetta hevur gingið væl.

– Ikki minst tey frá Skandinavisku Barnamissiónini hugnaðu sær undir stuðulskonsertini, sigur Angela.

Og hon fegnast um, at endamálið við konsertini eydnaðist.

– Tað vóru eini 18, sum teknaðu seg sum faddur. Ein faddur hjálpir trimum børnum. Og so var eisini eitt lítið yvirskot av konsertini, ið fer til felagsskapin, sigur Angela Petersen.

# Guns n' Roses á Roskilde

**Tá Guns N' Roses seinastu ferð vitjaði í Danmark var bólkurin heimsins størsta rokkorkestur, nógv vatn er runnið í ánni seinastu 13 árini, men nú verður bólkurin eftir øllum at døma, at hoyra á tí millum føroyingar so væl umtókta Roskilde Festivalinum**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Axl Rose er einasti upprunaligi limurin í Guns N' Roses*

Sambært svenska bookingfelagnum EMA Telstar spælir Guns N' Roses á ársins Roskilde Festivali. Hetta er eitt av trimum spælingum í Norðurlondum, hinar spælingarnar eru tó ikki almennar enn. Men tað man vera heldur ivasamt um nakar av føroysku festivalunum er á listanum.

Gaffa.dk hevur havt samband við bookingfelagið, og hevur fingið váttað, at 29. juni spæla Axl Rose og hansara nýggja Guns N' Roses á appilsingula pallinum á Roskilde Festivalinum. Um konsertin verður veruleiki, so er hetta fystu ferð í 13 ár, at Guns N' Roses spæla í Danmark. Bólkurin er eisini á skránni á fleiri øðrum evropeiskum festivalum.

Enn er eingin dagfesting almannakunngjørd fyri nýggju fløguna Chinese Democracy, ið verður fyrsta fløga við nýskrivaðum tónleiki hjá Guns N' Roses í 15 ár. Axl Rose hevur tó sagt frá, at fløgan kemur út í ár, tað segði hann eisini í fjør og fyrra árið og árið fyri tað.

Tó er tað, eitt sindur meira sannlíkt hesuferð, eftirsum løg eru byrja at verða likin út á alnetið. Fyribils eru 4 løg at finna á ymiskum heimasíðum. Løgini IRS, Better, There was a time og The Blues koma fram av og á og liggja frammi, inntil plátufelagið hjá Guns N' Roses stongir heimasíðirnar.

## Blóðgevarar hittast í Suðuroy

Í annaðkvøld, týskvøldið 7. mars, hevur felagið hjá blóðgevarum aðalfund í TB-húsinum á Tvøroyri.

Felagið sigur, at aftur í ár verður roynt at skipa fyri einum hugnaligum fundi, og umframt val av nevnd, er ymiskt annað á skránni.

Kunnað verður um trygging av blóðgevarum og kostráðgevari sigur frá um samband ímillum kostin og blóðgóðsku.

Eisini verða tær vælkendu dansigenturnar at síggja.

Felagið vónar at uppmøtingin verður góð, so fleiri fáa kunnleika um virksemið hjá felagnum og soleiðis at nýggir blóðgevarar fáa hug at bjóða seg fram.





## Søkt verður eftir einum fólki til Smyril Blue Water

SBW søkir eftir einum skrivstovufólki. Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

**Starvið fevnir um:**
Avgreiðslu av inngangandi farmi
Kundaavgreiðslu
Vanligt skrivstovuarbeiði
Trailarastýring
Estimering av útreiðslum

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst, at umsøkjarin hevur royndir innan skrivstovuarbeiði. Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur skrivstovuútbúgving.

Neyðugt er, at viðkomandi er vanur at arbeiða við teldu.

Dentur verður lagdur á, at viðkomandi kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanaðarviðurskifti:**
Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt sambært avtalu.

Umsóknir við møguligum prógvum skulu sendast til

Smyril Blue Water P/F
Att. Heðin Joensen
Postsmoga 3296
FO-110 Tórshavn
hedinj@sbwcargo.com

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. mars 2006

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Heðin Joensen á tlf. 345962

...Nordatlantens hurtigste fragtrute!


# Stórur áhugi fyri Summar Festivalinum

**Fyrireikararnir av Summar Festivalinum fegnast um at hava fingið Shu-bi-dua og The Rasmus at spæla í festivalinum í summar**

FESTIVALUR
*Dagfinn Olsen*




*Fyrireikararnir av Summarfestivalinum hava longu merkt stóran áhuga, nú tey bæði fyrstu nøvnini á plakatini eru avdúkað*

– Okkara festivalur skal vera ein breiður og fólksligur festivalur, og tí eru tveir bólkar sum Shu-bi-uda og The Rasmus sera væl egnaðir til Summar Festivalin, siga fyrireikararnir, sum eisini fegnast um, at áhugin fyri festivalinum er stórur

Fríggjadagin avdúkaðu fyrireikararnir av Summar Festivalinum tvey av útlendsku nøvnunum, sum skulu spæla á festivalinum í summar. Úr Danmark kemur kanska besti danski festivalbólkurin Shu-bi-dua, og úr Finlandi kemur rockbólkurin The Rasmus, sum ungfólk kenna frá MTV og hitlistum kring Europa.

Fyrireikararnir av Summar Festivalinum fegnast um at hava fingið hesar bólkar at spæla í festivalinum í summar.

– Okkara festivalur skal vera ein breiður og fólksligur festivalur, og tí eru tveir bólkar sum Shu-bi-uda og The Rasmus sera væl egnaðir til Summar Festivalin, sigur Steintór Rasmussen, ein av fyrireikarunum.

– Vit hava eisini fingið sera nógvar positivar reaktiónir, síðani hesir báðir bólkarnir vóru kunngjørdir. Áhugin fyri Summar Festivalin er sera stórur, fólk gleða seg til tiltakið, og longu fyrsta dagin kom veruliga gongd í atgongumerkjasøluna, sigur Steintór Rasmussen.

3000 tey fyrstu vikuskiftispassini til Summar Festivalin verða seld fyri serliga prís. Hesi kunnu keypast á Shell-støðunum kring landið fyri 495 krónur.